


## Søk starvið sum sálarfrøðingur til Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu

Hevur tú eina sterka og sjálvstøðuga hond, ið kann koyra undir og beina inn á rættar leiðir, ein stóran og brennandi áhuga í barnavernd, og dugir tú at samstarva við onnur um at betra gerandisdagin hjá børnum og ungum? So ert tú tann, sum vit leita eftir.

Í starvinum kemur tú beinleiðis í samband við børn, ung og familjur. Tú fært høvi at gera ein stóran og avgerandi mun í lívinum hjá nógvum børnum og ungum, og tú kanst ávirka teirra framtíð.

**VIT BJÓÐA TÆR:**

- Eitt avbjóðandi, fjølbroytt og áhugavert starv
- Fakliga menning gjøgnum tætt samstarv við sosialráðgevar og aðrar sálarfrøðingar í Tórshavnar kommunu
- Ávirkan á egið starv og barnaverndarøkið í Tórshavnar kommunu
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har strembað verður eftir at arbeiða á høgum fakligum støði

**TÚ FERT AT:**

- Ráðgeva og vegleiða sosialráðgevar á deildini
- Gera sálarfrøðiligar kanningar og metingar av børnum og ungum
- Vegleiða og geva fosturfamiljum og øðrum, sum eru um børnini í gerandisdegnum, ráð
- Viðgera børn, ung og familjur teirra sálarfrøðiliga
- Supervisera fosturforeldur, familjustuðlar o.a.

Í starvinum fert tú at starvast saman við fimm sosialráðgevum, trimum skrivarum, einum leiðara og einum toymi við seks familjuráðgevum. Eisini fert tú at samstarva við fólk úr skúlum, dagstovnum, døgnstovnum, barnapsykiatri, Barnaverndarstovuni, Barnatænastuni, Barna og Ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu og NSR-eindini í Tórshavnar kommunu.

**VIT VÆNTA, AT TÚ:**

- Ert útbúgvin cand. psych. ella cand. pæd. psych. Ynskiligt er, at tú hevur autorisatión. Um tú ikki hevur autorisatión, so vilja vit tryggja, at tú fært í boði ta neyðugu supervisjónina og skeiðini, sum kunnu leiða/føra teg fram til autorisatión.
- Hevur royndir innan arbeiði við børnum, ungum og familjum
- Hevur áhuga í barnasálarfrøði, serstakliga áhuga í og vitan um børn og ung við psykososialum trupulleikum
- Hevur góð evni at samstarva og arbeiða sjálvstøðugt

**SETANAR- OG LØNARVIÐUSKIFTI**

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

**UMSÓKNARFREIST**

Umsókn við prógvi og øðrum viðkomandi skjølum skal vera Tórshavnar kommunu í hendi seinast 8. desember 2008. Umsóknin skal sendast til Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, Fo-110 Tórshavn.

**MEIRA FÆST AT VITA** um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, leiðara á Sosialu Deild, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, tel 302010.

*Tórshavnar kommuna umboðar 19.500 íbúgvar, sum húsast á 173 km2. Tórshavnar kommuna hevur tilsamans 1400 fólk í starvi. Í sjálvari umsitingini starvast 130 fólk. Tað eru tríggjar fyrisitingar: trivnaðar-, mið- og tekniska fyrisitingin. Í Tórshavnar kommunu leggja vit dent á fakliga menning, útbúgving og trivnaðartiltøk. Arbeiðsumhvørvið er dynamiskt, vit hava eina nútímans leiðslutilgongd og vit arbeiða í tøttum samskifti við borgaran.*

Lesið meira um størvini á **www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna